# U19 hevur úttøkuvenjing

U-19 landsliðsvenjarar, hava sent boð eftir hesum spælarum til úttøkuvenjing mikukvøldið: Levi Hansen Skála, Trúgvi Askham FSV, Ólavur í Ólavstovu HB, Kristoffur Jacobsen KÍ, Bogi Løkin NSÍ, Einar Hansen NSÍ, Jón Krosslág VB, Jóhan Davidsen Skála, Frank Poulsen ÍF, Sam Jacobsen GÍ John Hansen B36, Johan Ellingsgaard B36, Ári Samson KÍ, Mathias Samuelsen KÍ, Rógvi Rygshamar LÍF, Henning Joensen VB, Filip Jacobsen NSÍ, Andreas Poulsen EB/Str., Rúnar í Lon Jacobsen B36, Brian Hansen EB/Streymur, Tonny Kruse EB/Streymur, Niklas Eysturoy HB og Jan Martin Mortensen NSÍ.

# ÍF Føroyar nærkast toppinum

Besta mansliðið hjá føroyska útisetafelagnum, ÍF Føroyar, hevur nú otað seg upp í oddin í Keypmannahavnarseriuni. Leygardagin vann liðið 3-1 á botnliðnum Union. Málini skutu Pætur Dahl, Jørgin Meitilberg og Allan Michelsen. Hin bæði oddaliðini taptu sínar dystir, og tí hevur ÍF Føroyar styrkt um sína støðu í oddinum. ÍF Føroyar liggur nevniliga á øðrum plássi á stigatalvuni - trý stig aftanfyri oddaliðið. Fremsta liðið flytur beinleiðis upp, meðan liðið á øðrum plássi sleppur at spæla uppflytingardyst. ÍF Føroyar hevur nú ein dyst eftir áðrenn summarsteðgin.







eisini gott flog, og áðrenn hálvt málið var rógvið, var Ørnin fremst, og síðani var spurningurin bara, hvussu sannførandi sigurin fór at verða.

At Sílið skuldi verða næstfremst tóktist tað leingi ikki at vera nakar ivi um. Men á síðsta teininum bjóðaðu bæði Ritan og Jallurin Sílinum av. Tær úr Havnar Róðrarfelag megnaðu tó at halda avbjóðararnar aftanfyri seg, men tað var sera tætt. Á málinum var Sílið skutin frammanfyri Rituna, sum var tað mesta av einari bátslongd undan Jallinum.

Avrikið hjá teimum umborð á Rituni kundi bent á, at tað fer at verða spennandi á Jóansøku. Í hvussu so er í kappingini um næstfremsta plássið. Á Kollafirði kiksaði tað hjá Rituni, sum endaði á fimta plássi. Hesa ferð endurvunnu tær triðja plássið, sum tær vunnu á Norðoyastevnu.

At Sílið, Ritan, Jallurin ella nakar annar bátur skal gera nakað við Ørnina man vera rættuliga ivasamt.

**6-mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| 1. Riddarin | 4.54,20 |
| 2. Lómur | 4.59,00 |
| 3. Smyril | 5.05.00 |
| 4. Jarnbardur | |
| 5. Hvessingur | |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Riddarin | 19 stig |
| 2. Lómur | 17 stig |
| 3. Smyril | 12 stig |
| 4. Jarnbardur | 10 stig |
| 5. Hvessingur | 6 stig |

**5- mannafør gentur**

| | |
|---|---|
| 1. Frúgvin | 5.38,21 |
| 2. Hvassi | 5.39,23 |
| 3. Blikur | 5.40,03 |
| 4. Drekin | |
| 5. Havfrúgvin | |
| 6. Ørnin | |
| 7. Firvaldur | |
| 8. Sílið | |
| 9. Dúgvan | |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Frúgvin | 19 stig |
| 2. Blikur | 14 stig |
| 3. Drekin | 12 stig |
| 4. Havfrúgvin | 9 stig |
| 5. Hvassi | 7 stig |
| 6. Dúgvan | 3 stig |
| 7. Ørnin | 3 stig |

**5-mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| 1. Ørnin | 5.24,12 |
| 2. Sílið | 5.29,09 |
| 3. Ritan | 5.30,13 |
| 4. Junkarin | |
| 5. Drekin | |
| 6. Tjaldrið | |
| 7. Báran | |
| 8. Blikur | |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Ørnin | 21 stig |
| 2. Sílið | 15 stig |
| 3. Ritan | 10 stig |
| 4. Jallurin | 10 stig |
| 5. Junkarin | 7 stig |
| 6. Drekin | 3 stig |

# Ørvur lyftið lagið í HR




**Hesa ferð kiksaði tað hjá Knørri, meðan Ørvur við sannførandi avriki tryggjaði Havnar Róðrarfelag fyrsta sigurin í hesum árinum**

8-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Eftir Sundalagsstevnuna varð víst á, at tað var merkisvert, at eingin manning hjá størsta og traditiónsríkasta róðrarfelagnum av øllum, Havnar Róðrarfelag, hevði vunnið nakran róður.

Sjálvandi hava tey í Havnar Róðrarfelag longst eftir sigrum og steypum, og tí var einki at siga til, at fagnaðurin var ovurhonds stórur, tá ið Ørvur í sannførandi stíli kom fyrstur á mál, tá ið 8-mannaførini kappaðust.

Fagnaðurin var stórur bæði á bátinum og millum mongu og trúføstu áskoðararnar, sum fylgja bátunum hjá Havnar Róðrarfelag.

Hóast talan var um fyrsta sigurin í ár, so var hann ikki óvæntaður. Knørrur var fremstur á Norðoyastevnu og aftur á Sundalagsstevnuni. Í Klaksvík var Knørrur tað mesta av einari bátslongd undan Ørvi, og í Kollafirði fóru bátarnir á mál mest sum stavn um stavn.

Argjabáturin var bragdligur í startspurtinum, og Argjabáturin fylgdi leingi væl við. Hjá Knørri stemmaði tað ikki rættuliga. Teir fingu tíðliga gula kortið, og tað tóktist sum um, at sinniliga yvirskotið, sum teir hava havt í tveimum teimum fyrstu kappingunum, var burtur.

Á 1000 metra málinum var Ørvur fremstur, og so gjørdist fjarstøðan aftur til hinar bara størri og størri. Knørrur stríddist leingi við at taka Argjabátin. Tað gekk striltið, men at enda glapp. Tá var Ørvur runnin væl framum, og í endaspurtinum var eingin spurningur um, at tað fór at verða Ørvur, sum vann. Avrikið hjá Ørvi hesa ferð ber boð um, at spenningur nú er komin í kappingina um FM.

Leygardagin á Jóansøku í Vági fæst at síggja, um teir umborð á Knørri hava funnið stevið og áralagið aftur.

**8-mannafør**

| | |
|---|---|
| 1. Ørvur | 7.10,23 |
| 2. Knørrur | 7.14,08 |
| 3. Argjabáturin | 7.17,12 |
| 4. Nevið Reyða | 7.34,20 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Knørrur | 19 stig |
| 2. Ørvur | 17 stig |
| 3. Argjabáturin | 12 stig |
| 4. Nevið Reyða | 9 stig |